# NØVN

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

*Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.*

## MERKISDAGAR

**60 ára føðingardagur**
Mikudagin hin 18 nov. verður Eydna Hansen, Fuglafjørður, 60 ár. Dagurin verður hildin heima hjá soninum Hans Hansen, Hjallavegur 56, Saltangará, leygardagin hin 21. nov. frá kl. 18. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**75 ára føðingardagur**
Fríggjadagin 20. nov. verður Jørleif Hansen, Fuglafjørður, 75 ár. Dagurin verður hildin saman við familjuni.

**80 ára føðingardagur**
Leygardagin 21. nov. fyllir Marianna Joensen, Kvívík, 80 ár. Dagurin verður hildin heima frá kl. 11 til 18.

**80 ára føðingardagur**
Leygardagin 21. nov. verður Jukim Olsen, Lágargarður, 80 ár. Dagurin verður hildin saman við teimun nærmastu.

**80 ára føðingardagur**
Hósdagin 26. nov. verður Jana Poulsen, vanliga nevnd Jana í Garði, Strendur, 80 ár. Dagurin verður hildin hjá dóttrini Maritu á Fríðufløtum 2, frá kl. 18. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**100 ára føðingardagur**
Mánadagin 23. nov. verður Jenny Jacobsen á Ellisheiminum, V.U.Hammershaimbsgøta, Tórshavn, 100 ár. Móttøka verður á Ellisheiminum millum kl. 15 og 18.

**Silvurbrúdleyp**
Sunnudagin 18. okt. høvdu Birgit og Hanus Hansen, klaksvík, silvurbrúdleyp. Dagurin verður hildin leygardagin 12. des. kl. 19 í Badmintonhøllini í klaksvík. Tey sum ynskja at gleðast saman við silvurbrúðarparinum, verða vinarliga biðin um at siga frá á tlf. 227479 ella 455592. Ella við at skriva til: bsh@post.olivant.fo áðrenn 3. des.

**Silvurbrúdleyp**
Týsdagin 24. nov. hava hjúnini Oluffa og Niels Andreasen, Klaksvík, silvurbrúdleyp. Dagurin verur hildin í K.F.U.M & K Klaksvík, fra kl. 18, har øll eru hjartaliga vælkomin.

**Silvurbrúdleyp**
Týsdagin 29. des. halda við bæði, Pálin og Henry Olsen, Rituvík okkara silvurbrúdleyp. Dagurin verður hildin við veitslu í bygdarhúsinum í Leirvík kl. 19. Tit, ið ynskja at gleða okkum við at koma, kunnu siga frá á tlf. 219134 (Henry) ella 223534 (Pálin). Til ber eisini at senda ein teldupost: henry-o@olivant.fo ella palin.olsen@skulin.fo áðrenn 15. desember.

**Gullbrúdleyp**
Hósdagin 19. nov. hava hjúnini Ása og Jógvan Rasmussen, í Miðvági, gullbrúðleyp. Dagurin verur hildin heima, frá kl. 16. Øll eru vælkomin.

**Gullbrúdleyp**
Leygardagin 21. nov. hava hjúnini Annelena og Arnstein Niclasen, Hoyvík, verið gift í 50 ár. Dagurin verður hildin saman við familjuni í Hornahúsinum í Havn.

**Gullbrúdleyp**
Sunnudagin 22. nov. hava hjúnini Elsipa Jóhanna og John Frederiksen, í Miðvági, gullbrúdleyp. Dagurin verður hildin heima frá kl. 16.

**Gullbrúdleyp**
28. nov. hava hjúnini Tóra og Ólavur Nolsøe Olsen, Fuglafjørður, gullbrúdleyp. Dagurin verður hildin í bygdahúsinum í Leirvík leygardagin 5. des. kl. 18. Tey ið vilja halda dagin saman við okkum, kunnu siga frá á tlf. 444159 - 737751 ella toraolavur@gmail.com áðrenn 20. nov.

**Gullbrúdleyp**
Leygardagin 5. des. hava hjúnini Jóna og Kjartan Z. Jacobsen, Klaksvík, gullbrúdleyp. Dagurin verður hildin í Skálanum frá kl. 18. Tey ið vilja gleða okkum við at koma, verða biðin um at siga frá á heimatlf. okkara 455646, tlf. 224750 og tlf. 225698, til og við leygardagin 21. nov.

**Gullbrúdleyp**
Leygardagin 5. des. kunnu hjúnini Edith og Páll Klettskarð, í Haraldssundi, halda gullbrúdleyp. Dagurin verður hildin í bygdarhúsinum í Haraldssundi í millum kl. 12 og 17. Tey, ið vilja gleðast saman við okkum, eru hjartaliga vælkomin.

**Diamantbrúðleyp**
Fríggjadagin 4. des. hava Kirsten og Daniel Næs, Hvalba, diamantbrúðleyp. Tey, sum vilja heilsa uppa diamantbrúðarparið eru vælkomin hjá Monu og Eliesar, Toftavegur 15, frá kl. 14-19.

# Jukim Olsen 80 ár



Leygardagin 21. novembur fyllir Jukim Olsen í Havn 80 ár.

Hóast Jukim er svínoyingur, hevur hann í mong ár verið ein kend býarmynd í Havn.

Jukim sigldi sum ungur og var á háskúla, bæði í Føroyum og í Svøríki. Í 1955 fór hann á stýrimansskúla í Havn og tók prógv í 1957. Eftir tað tók hann skipsførarprógv í Keypmannahavn og sigldi í nøkur ár kring um í heiminum við skipum hjá danska reiðarínum J.Lauritzen.

Lívsstarvið hjá Jukim kom at verða á Matrikulstovuni í Havn, har hann tók skeið í matrikulering og sum tekniskur assistentur. Umframt sítt arbeiði hevur hann verið virkin í samkomuni í Ebenezer. Hann hevur altíð verið sera trúfastur og hevur vitjað fólk, bæði í heimum, á sjúkrahúsum og á røktarheimum.

Í 1957 giftist Jukim við Elsebeth, dóttir Ellu og Andrew Sloan í Havn. Tey fingu trý børn: Elin Jógvan og Katrin. Elsebeth andaðist 25. september í 2000.

Føðingardagurin verður hildin saman við teimun nærmastu.

*-red*

## Føðingar



*17. nov. fingu Anna T. og Hans F. Mikkelsen, Kambsdalur ein son. Hann eitur Josva. Hann var 53 cm langur og vigaði 4350 gr.*

3. november fingu Rakul og Arni Brattaberg, Vágur, ein son. Hann var 55 cm langur og vigaði 3550 gr.

3. november fingu Jóndis og Kaj Madsen, Hvalba, eina dóttur. Hon var 50 cm long og vigaði 3470 gr.

8. november fingu Oddný-Ann Joensen og Suni Mortensen, Vágur, ein son. Hann var 56 cm langur og vigaði 4100 gr.

11. november fingu Rannvá og Finn Johannessen, Vágur, ein son. Hann var 53 cm langur og vigaði 3610 gr.

12. november fingu Helena Johannesen og Kristian Johannesen, Klaksvík, ein son. Hann var 49 cm langur og vigaði 2900 gr.

12. november fingu Nathalia og Anfinn Isaksen, Klaksvík, ein son. Hann var 51 cm langur og vigaði 3300 gr.

12. november fingu Joan Jacobsen og Magni Jacobsen, Saltangará, eina dóttur. Hon var 55 cm long og vigaði 4200 gr.

14. november fingu Sólgerð Henriksen og Hans Bogi Ellefsen, Sandavágur, eina dóttur. Hon var 57 cm long og vigaði 5350 gr.

17. november fingu Fríða Andreassen og Sigmund Jørgensen, Tórshavn, ein son. Hann var 56 cm long og vigaði 4350 gr.

18. november fingu Zvonko og Sára Mrdalo, Skála, eina dóttur. Hon var 55 cm long og vigaði 4100 gr.

†

## Andlát og jarðarferðir

Kistan við **Henry Ingolf Steingrund** fer úr kapellinum á Landssjúkrahúsinum fríggjadagin kl. 17. Jarðarferðin verður úr Glyvra kirkju leygardagin 21. november kl. 13.

**Helena Hansen, Toftir**, andaðist á Landssjúkrahúsinum týsdagin, 85 ára gomul. Farið verður úr kapellinum á Landssjúkrahúsinum fríggjadagin kl. 19. Jarðarferin verður úr Fríðrikskirkjuni leygardagin kl. 13. Tey, ið vilja minnast Helenu, kunnu lata missiónshúsinum Thabor á Toftum eina pengingagávu. Konta í peningastovnunum.

†

Kunngjørt verður fyri ætt, vinum og kenningum, at kæri maður, pápi og abbi okkara

**Jákup Martin Wang**
Kvívík

andaðist í heiminum 19. november, 80 ára gamal.

*Vegna familjuna*
**Palma, Anna og Karstin**